# Kommunan onga ábyrgd

**Heðin Mortensen vísir aftur, at Tórshavnar Kommuna hevur nakra ábygd av umstríddu bingjunum við fýrverki hjá sp/f Skot. Tvørturímóti hjálptu vit teimum við einum trupulleika, sigur borgarstjórin.**

UMSITING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Kommunan hevur handlað rætt í hesum máli. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, er avgjørdur í umstrídda fýrverksmálinum, sum er umrøtt í Sosialinum síðstu dagarnar.

Bingjurnar hjá smápartafelagnum Skot elvdu herfyri til, at ein onnur fyritøka, partafelagið Borg, var í vanda fyri at missa sítt góðkenda loyvi til at goyma spreingievni á Bøllureyni í Havn.

Kommunan kravdi av Skot, at fyritøkan flutti sínar bingjur við fýrverki úr kommunala salttunnlinum við Oyggjarvegin, niðan á økið á Bøllureyni. Men tá Arbeiðseftirlitið seinni staðfesti, at frástøðan millum bingjurnar og spreingigoymsluna bara var 34 metrar, og ikki kravdu 190 metrarnar, hótti Arbeiðseftirlitið við at taka loyvið frá Borg, sum eigur goymsluna.

- Vit fluttu okkara bingjur niðan á økið á Bøllureyni, við verandi dynamittgoymslu, eins og kommunan gav okkum skrivlig boð um. Vit settu bingjurnar á einasta slættan, sum er á økinum, segði Rói Poulsen við Sosialin í vikuni. Hansara fyritøka, sp/f Skot, hevur fingið skrivligt fyribilsloyv at hava bingjurnar standandi á Bøllureyni, til 7. januar 2008.

Men Heðin Mortensen er ikki samdur í, at kommunan hevur ábyrgdina av, at P/F Borg kom í trupulleikar við síni góðkenning.

- Kommunan vísti á økið við Bøllureyn. Men tað er ábyrgdin hjá fyritøkuni, sum eigur bingjurnar, at syrgja fyri, at hon heldur allar galdandi lógir og reglur, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

## Úr tunnlinum

Tórshavnar kommuna hevur lagt stóran dent á og orku í, at fýrverkið skuldi burtur úr tunnlinum við Oyggarvegin, sjálvt um hvørki Brunaumsjónin ella aðrir myndugleikar høvdu trupulleika av, at fýrverkið stóð har.

- Mín trupulleiki er, at økið er eitt arbeiðspláss. Um so er at bingjurnar standa inni avbyrgdar inni í tunnlinum, so er sjálvandi eingin trupulleiki við trygdini. Men tað ber jú ikki til í praksis. Ætlanin við fýrverkinum er væl, at tað skal seljast. Tað merkir, at tað skal pakkast um. Og tá er tað ikki longur ein avbyrgd goymsla, men eitt arbeiðspláss. Og hvussu tá við trygdini, spyr Heðin Mortensen, og heldur fram:

- Harumframt sleppa vit ikki framat okkara egnu goymslu, um so er at økið skal standa avbyrgt, sigur borgarstjórin og vísir á, at á økinum er bæði Brandstøð og eitt stórt verkstað hjá vegdeildini. Og inni í tunnlinum er bæði saltgoymsla, umframt at jólabýurin hjá kommununi stóð har, til hann varð settur upp í miðbýnum.

- Tað, sum hendi var, at Brunaumsjónin og politiið hildu tað vera í lagi, um so er at fýrverkið stóð avbyrgt í tunnlinum. Men hvør hevði fingið ábyrgdina, um so er at har hendi ein vanlukka, spyr Heðin Mortensen og svarar sjálvur:

- Tá hevði Tórshavnar Kommuna og í síðsta enda borgarstjórin fingið ábyrgdina. Og tað taki eg ikki ábyrgdina av. Tí skuldi fýrverkið burtur úr tunnlinum, sigur Heðin Mortensen.

## Skjýtur aftur

Í Sosialinum í gjár helt Høgni Mikkelsen, býráðslimur, lítið um handfaringina hjá býráðnum í hesum máli.

- Her er talan um ungar menn, sum royna at byrja eina fyritøku. Sum kommuna kann man ikki ganga og renna eftir teimum alla tíðina. Hetta minnir mest um jagstran, og tað er skeivt, haldi eg, sigur Høgni Mikkelsen.

Høgni Mikkelsen viðgekk, at sjálvandi er tað altíð eigararnir, sum hava ábyrgdina av, at øll síni viðurskifti eru í lagi.

- Avgjørt. Og tað var eisini eitt mistak, at fýrverkið nakrantíð kom at standa á Hálsi. Men tá fýrverkið seinni bleiv flutt niðan í grótbrotið Undir Varða, og bæði Brunaumsjónin og Arbeiðseftirlitið mettu bingjurnar standa væl har, so átti kommunan ikki at gjørt meira við málið, sigur Høgni Mikkelsen.

Heðin Mortensen er púra ósamdur:

- Her er ikki talan um nakra jagstran. Tvørturímóti. Vit hava roynt at hjálpa teimum, eftir at teir fingu ein akuttan trupulleika, tí fýrverkið jú ikki kundi standa á Hálsi. Gamaní kunnu teir halda fram við sínum virksemi, men so mugu teir eisini fáa síni loyvi og onnur viðurskifti í lagi. Tað er teirra ábyrgd, ikki ábyrgdin hjá Tórshavnar Kommunu, sigur Heðin Mortensen.



*- Vit jagstra ikki nakran. Tvørturímóti hava vit roynt at hjálpa eini fyritøku, sum fekk ein akuttan trupulleika, sigur Heðin Mortensen um fýrverksmálið*

# Almannastovan viðgongur mistak

**Tað var eitt mistak, tá Almannastovan um dagarnar strikaði avslátturin, sum pensjonistar higartil hava fingið við tyrluni. Nú skal arbeiðið gerast umaftur, og nýggj avsláttarkort sendast pensjonistum.**

MISTAK
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tað elvdi til høvuðbrýggj, bæði hjá pensjonistum, Útoyggjafelagnum og landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum, tá Almannastovan um dagarnar sendi út nýggju avsláttarkortini til pensjonistar.

Í nógv ár hevur ein skipan verið galdandi, har pensjónistar fáa 50% í avsláttri, tá ið teir ferðast við Strandferðsluni, Bygdaleiðum og tyrluni hjá Atlantsflogi. Men í nýggjstu kortunum var orðið "tyrlan" strikað út við svartari tyssj. Tað fekk pensjonistar at undrast og harmast, og formaðurin í Útoyggjafelagnum, Óla Jákup úr Dímun, gjørdist ikki sørt kløkkur, tá Rás2 gjørdi hann varugan við broytingina. Tá hevði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, longu reagerað:

- Hetta góðtaki eg ikki uttan víðari og tí má tað kannast til botns, segði Hans Pauli Strøm við Portalin í vikuskiftinum.

Hjá Atlantsflog hvukku tey eisini við:

- Vit hava ikki gjørt nakra broyting í avsláttarskipanini, segði Theodor Joensen, deildarleiðari hjá Atlantsflog, við Rás2 mánadagin.

## Bara fyritíðarpensjonistar

Petra Jónsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, viðgongur, at talan er um eitt mistak.

- Almannastovan fekk eina áheitan frá Atlantsflog fyrst í oktober, har felagið kunnaði okkum um, at tey høvdu trupulleikar av okkara avsláttarkortum. Ein trupulleika, sum stendst av, at vit nýta somu avsláttarkort til fyritíðarpensjonistar, tvs. fólk sum eru undir 67 ár, sigur Petra Jónsdóttir Joensen.

Trupulleikin liggur í, at Atlantsflog bara gevur fólki, sum eru 67 ár og eldri, avsláttur við tyrluni. Og tí vildi felagið hava Almannastovuna at gera avsláttarkortini, ið verða send pensjonistum, greiðari.

- Tað, sum so hendir er, at vit strika avslátturin uppá 50 prosent við tyrluni á kortunum til allar pensjonistar, tvs bæði fyritíðarpensjonistar og fólkapensjonistar. Avleiðingin av tí er, at øll tey, sum hava fingið pensjónskort eftir 3. oktober hava fingið eitt kort, har avslátturin við tyrluni er strikaður, sigur Petra Jónsdóttir Joensen.

Hon leggur afturat, at praksis síðstu árini hevur verið, at fólk undir 67 ár hava ikki fingið avslátturin.



*Pensjonistar, men kortini ikki fyritíðarpensjonistar, sleppa eisini í framtíðini at ferðast við tyrluni fyri hálvan prís.*

## Verður rættað

Stjórin á Almannastovuni metir, at tilsamans er talan um 52 fólkapensjonistar og 30 fyritíðarpensjonistar, sum hava fingið skeivu kortini.

- Nú fara vit at senda øllum hesum eitt bræv og eitt nýtt kort, soleiðis at mistakið verður rættað, og at tað verður heilt greitt, hvør hevur rætt til avsláttur við tyrluni, sigur Petra Jónsdóttir Joensen og leggur afturat:

- Tað, sum hendir nú, er at vit fara at broyta okkara kort, so fólkapensjonistar fáa eitt kort, sum eisini gevur rætt til avsláttur við tyrluni, meðan fyritíðarpensjonistar fáa eitt annað avsláttarkort, sum ikki er galdandi fyri tyrluna.

Stjórin á Almannastovuni viðgongur, at íkomna støðan er sera óheppin.

- Jú, tað er óheppið. Og tað hevði verið betur, um okkara avsláttarkort hevði verið greiðari. Og tað er tað, sum vit nú fara at broyta, sigur Petra Jónsdóttir Joensen.